# Knút verður róstur

**Knút Háberg Eysturstein hevur fær sera gott skoðsmál í danska tíðarritinum, Geiger**

UMMÆLI

Geiger er tónleikablað/heimasíða, ið leggur serligan dent á alternativan og elektroniskan tónleik. Fyri suttum síðani fekk Havsglóð eisini gott ummæli í Gaffa, størsta danska tónleikablaðnum.

Ummælarin í Geiger leggur fyri við at nevna Havsglóð hjá Knút sum hina nýggjasta útgávuna í røðini av sera spennandi føroyskum útgávum seinastu árini so sum Clickhaze, Eivør og Høgni Lisberg, sum jú eisini hava fingið frálík ummæli m.a. í Geiger. Hetta vísur enn einaferð á tann stóra týdning og ávirkan Tónleikasamtakið GRÓT og umhvørvið kring felagið hevur havt á progressiva partin av føroyskum tónleikalívi seinastu árini, ikki bara í Føroyum, men eisini í øðrum Norðurlondum.

Um fløguna "Havsglóð" sigur Geiger millum annað, at hon er ein áhugaverd samanseting av tí stóra og atmosferiska norðuratlantiska tónleikastílinum, ið vit m.a kenna frá íslendsku Sigur Rós, og einum meira jørðbundnum og siðbundnum singer/ songwriter stíli. Ein samanseting sum, hóast hon er nærmast skizofren til tíðir, er full av poesi og vakur-leika. Eisini verður sakt at Knút er sannur yrkjari, serliga í teim føroysku tekstunum, har hann ber fram sangirnar um tey stóru og álvarsligu evnini, deyðan, lívið og frelsuna, við góðum handalagið og inniligari og vakrari rødd.

Ummælarin, Steffen B. Pedersen, endar við at siga, at tey nógvu ymisku hugskotini á fløguni eru við til at skapa eina friskliga og fjølbroytta heild; "...ikke blot gør det, at pladen kommer omkring så mange forskellige idéer, at man virkelig får nogle forskellige sider af Eystursteins store talent at se – det skaber, midt i skizofrenien, også en forfriskende afveksling på en plade, der ellers så nemt kunne være blevet en gang statisk tristesse. Netop derfor – og fordi man får ni stærke sange, der bærer hjertet uden på tøjet – bør man stifte bekendtskab med denne virkelig interessante færøske sangskriver".

Í næstum verður ein samrøða við Knút inni á heimasíðuni hjá Geiger og hann er eisini boðin at vera gestaummælari á síðuni. Hetta er sjálvsagt eitt stig rætta vegin fyri Knút sum í løtuni arbeiðir við promotion uttanlanda, m.a við at fáa umrøðu í fjølmiðlunum í grannalondunum og aðrastaðni við.

Alt ummælið úr Geiger kann lesast á http://www.geiger.dk/anmeldelser/anmeldelse.php?id=1514



*Knút Háberg Eysturstein*


ENDABRESTUR!

Nú er seinasta freist at stovna breiðband fyri

0,- kr.*)

Stovnar tú I-net Breiðband Privat frá Føroya Tele áðrenn 28. februar, geva vit tær stovningina púra ókeypis.

Seinasta freist er 28. feb. Spar 750,-

Við breiðbandi frá Føroya Tele fært tú nógv skjótari og støðugt fast internetsamband. Og so kanst tú eisini tosa í telefon, samstundis sum tú ert á netinum.

Føroya Tele hevur 3 ymisk hald at velja ímillum, ið øll eru gjørd til júst tín nýtslutørv. Og sjálvandi er hetta til kappingarføran prís har góð kundatænasta er ein sjálvfylgja.

Ring 808080, vitja www.tele.fo ella eina telebúð og fá I·net Breiðband til júst tín tørv...

I·net BREIÐBAND

*) Treytað av at tú teknar I·net privat breiðbandhald frá Føroya Tele í 6 mðr. Tilboðið er galdandi til og við 28. februar 2005. Vanligur prísur fyri stovning er kr. 750,-. Montørgjald og mótald, ið kann keypast frá Føroya Tele, er ikki íroknað. Sí meira á www.tele.fo.

FØROYATELE

petur & petur • 320870



veitst tú ikki tað?

Sosialurin



javnaðarflokkurin

tryggjar samstarv og loysnir - eisini á Fólkatingi



andrias petersen